# Special Olympics Føroyar á Rhodos Festivali

**Á júst lidnu Special Olympics leikunum vunnu føroysku luttakararnir seks heiðursmerki**

SPECIAL OLYMPICS
*tíðindaskriv*

Eitt Special Olympics Føroyalið var millum 1300 ítróttarfólk úr 48 londum við á Festivali á Rhodos frá 14.-21.mai.

Hesin festivalur, sum bygdi á evnið »Læra gjøgnum ítrótt«, varð settur leygarkvøldið 15. mai á tí gamla Akropolis Stadion á Rhodos.

Øll landafløggini vórðu borin inn; síðan komu londini og ymsu økini í Grikkalandi inn, og undan hvørjum av teimum bóru skótar navnaskelti. Festivalurin varð settur, Special Olympics flaggið vundið á stong og eldurin tendraður, og undirhaldandi parturin hevði bæði tónleik, sang og grikskan fólkadans.

Allan sunnudagin 16. mai vóru innleiðandi kappingar í svimjing, súkkling og kurvabólti. Føroyar vóru við í svimjing - Apolonia Justesen, Rannvá Strøm og Durita Strøm svumu hvør sínar tvær kappingar.

Tær innleiðandi kappingarnar hava til endamáls at bólka luttakararnar í hóskandi styrkisbólk. Apolonia kom í kvinnubólkin, Rannvá í sterkasta gentubólkin og Durita í sterkasta bólk í sínum svimjigreinum.

Mánadagurin var frídagur, og okkara gentur tóku av tilboðnum at vera við í eini stórari »Water Park« at kalla allan dagin. Hetta nutu tær og stuttleikaðu sær ófört.

Týsdag 18. mai og mikudag 19. mai vóru finalur í svimjing.

Fyrra dagin svam Apolonia 50 m frí í eini sera spennandi kapping, sum hon vann við einum megnartaki á seinastu 2-3 metrunum. Apolonia svam eisini 50 m bringu, og her var hon nógv fremst.

Rannvá svam eisini 50 m frí. Hon svam sera væl og kom á mál langt framman fyri hinar.

Seinna dagin svam Rannvá 50 m rygg. Hetta var ein óføra spennandi kapping, har sera javnt var ímillum tær fremstu. Tá komið var á mál, vóru vit í iva, um hon mundi vera nr. 2 ella 3. Hon gjørdist nr. 3.

Durita svam sínar kappingar. Fyrst 100 m bringu, har hon kláraði eitt annað pláss, og seinni 100 m frí, sum hon vann væl framman fyri nr. 2.

Hósmorgun 20. mai var heiðursmerkjahandan, og um kvøldið var endahátíð á torginum í Faliraki við fimleiki, fólkadansi og fýrverki.

Hóast okkara gentur eru vanar at svimja innandura, gekk væl hjá teimum uttandura í brennandi sól. Bæði Apolonia og Rannvá settu persónlig met í sínum svimjigreinum.

Special Olympics Føroyaliðið kom heim aftur leygarmorgunin - allar glaðar og móðar eftir stór avrik. 4 gull, 1 silvur og 1 bronsuheiðursmerki høvdu tær heim aftur við sær.

### Føroysku úrslitini á Special Olympics Festivalinum á Rhodos

| | Innleiðandi | finala | úrslit |
|---|---|---|---|
| **Durita Strøm** | | | |
| 100 m frí | 1.33,85 | 1.29,23 | gull |
| 100 m bringa | 1.58,82 | 1.59,44 | silvur |
| **Rannvá Strøm** | | | |
| 50 m frí | 41,68 | 40,76 | gull |
| 50 m rygg | 55,46 | 51,27 | bronsa |
| **Apolonia Justesen** | | | |
| 50 m frí | 39,0 | 39,38 | gull |
| 50 m bringu | 52,23 | 52,20 | gull |

# Skálarenning

**Roysnið skipaði fyri rennikapping á skálastevnuni um vikuskifitið**

RENNING
*Jákup Mørk*

Sum partur av skálastevnuni, sum varð hildin um vikuskiftið, var eisini ein rennikapping á skránni.

Tað var Roysnið, sum stóð fyri hesari, og varð kappast í ymsum aldursbólkum. Íalt tóku 84 rennarar lut í kappingini.

Úrslitini av kappingini framganga av yvirlitinum niðanfyri.

Dreingir -7 (ca. 1/2 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 04 | Betuel Hansen | 1997 | Roysnið |
| 2 | 2 | 09 | Beinir Johannesen | 1997 | Treysti |
| 3 | 2 | 16 | Ari Olsen | | 1998 |
| Strendur | | | | | |
| 4 | 2 | 31 | Jan Ingason Hansen | | 1997 |
| 5 | 2 | 35 | Martin Olsen | 1997 | Skáli |
| 6 | 2 | 44 | Magnus Petersen | 1998 | Skáli |
| 7 | 2 | 55 | Betuel R. Hansen | 1997 | Roysnið |
| 8 | 2 | 58 | Dánjal J. Joensen | 1997 | Skáli |
| 9 | 3 | 03 | Julian Mikkelsen | 1998 | Skáli |
| 10 | 3 | 06 | John E. Johannesen | 1998 | Skáli |
| 11 | 3 | 10 | Pauli Rasmussen | 1999 | Skáli |
| 12 | 3 | 11 | Dávid Johannesen | 2000 | Skáli |
| 13 | 3 | 52 | Ivan Mrdalo | 2000 | Skáli |

Dreingir -10 (ca. 1/2 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 44 | Albert R. Johannes. | 1995 | ÆLðurvík |
| 2 | 1 | 56 | Jóhan Hansen | 1994 | Nólsoy |
| 3 | 1 | 58 | Hendrik á Fríðriksm. | 1994 | Skáli |
| 4 | 2 | 01 | Allan Norðberg | 1996 | Strendur |
| 5 | 2 | 03 | Símin P. Poulsen | 1994 | Skáli |
| 6 | | | Jóh. Kristmundsson | 1994 | Skáli |
| 7 | | | Kjartan Johansen | 1996 | Strendur |
| 8 | | | Sverre Jensen | 1994 | Skáli |
| 9 | | | Kári Olsen | 1995 | Viðareiði |
| 10 | | | Eyðbjørn Joensen | 1996 | Skáli |
| 11 | | | Niklas Bangsholt | 1996 | Nólsoy |
| 12 | | | Martin Didriksen | 1994 | Skáli |
| 13 | | | Magnus Joensen | 1996 | Skáli |
| 14 | | | Sølvi Høgnesen | 1996 | Strendur |
| 15 | | | Kr. M. Jacobsen | 1996 | Strendur |

(vegna trupulleika við tíðtøkuni eru bert 5 tær fyrstu tíðirnar tøkar)

Dreingir -13 (ca. 3,4 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 13 | 45 | Jan E. Sørensen | 1991 | Treysti |
| 2 | 16 | 35 | Ólavur Mikkelsen | 1992 | Strendur |
| 3 | 16 | 40 | Hákun Hansen | 1992 | Nólsoy |
| 4 | 17 | 48 | Jákup Jacobsen | 1992 | Skipanes |
| 5 | 18 | 30 | Magnus Holm | 1991 | Nólsoy |
| 6 | 18 | 35 | Janus Gudmundsen | 1993 | Frælsi |
| 7 | 18 | 48 | Petur Eyð. Jacobsen | 1991 | Skáli |
| 8 | 20 | 39 | Sonni Johnsson | 1993 | Skáli |
| 9 | 21 | 00 | Tróndur Højgaard | 1991 | Skáli |
| 10 | 21 | 04 | Sámal Weihe | 1993 | Skáli |

Dreingir -17 (ca. 3,4 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 12 | 38 | Jóan Karl Joensen | 1987 | Bragdið |
| 2 | 12 | 52 | Á. F. Christiansen | 1989 | Treysti |
| 3 | 13 | 18 | DanielD. Rein | 1990 | Bragdið |
| 4 | 15 | 56 | Petur P. Mikkelsen | 1990 | Skáli |

Gentur -7 (ca. 1/2 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 31 | Elisabet Vang | 1998 | Hoyvík |
| 2 | 2 | 38 | Ata Joensen | 1997 | Skáli |
| 3 | 2 | 49 | Durita Mikkelsen | 1998 | Strendur |
| 4 | 2 | 51 | Karina Høgnesen | 2000 | Strendur |
| 5 | 2 | 52 | Kristina Knudsen | 1998 | Tórshavn |
| 6 | 2 | 58 | jóhanna Johannesen | 1998 | Skáli |
| 7 | 3 | 06 | Ronja Joensen | 1998 | Skáli |
| 8 | 3 | 08 | Nikol. Thorleifsson | 2000 | Skáli |

Gentur -10 (ca. 1/2 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 04 | Jórunn Hansen | 1995 | Roysnið |
| 2 | 2 | 07 | Sissal Skaale | 1994 | Nólsoy |
| 3 | 2 | 10 | Bjørk R. Svabo | 1996 | Frælsi |
| 4 | 2 | 18 | Maria Joensen | 1994 | Skáli |
| 5 | 2 | 20 | Ingibjørg Petersen | 1995 | Tórshavn |
| 6 | 2 | 24 | Milja Skaale | 1996 | Nólsoy |
| 7 | 2 | 28 | Dina Bech | 1996 | Skáli |
| 8 | 2 | 29 | Jana Joensen | 1995 | Skáli |
| 9 | 2 | 38 | Maria Joensen | 1995 | Nólsoy |
| 10 | 2 | 39 | Petra Weihe | 1996 | Skáli |
| 11 | 2 | 39 | Sólbjørg Jacobsen | 1995 | Skáli |
| 12 | 2 | 40 | Silja Kjærbo | 1994 | Skáli |

Gentur -13 (ca. 3,4 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 14 | 31 | Bjørk H. Olsen | 1991 | Bragdið |
| 2 | 19 | 17 | Rakul Joensen | 1993 | Nólsoy |

Gentur -17 (ca. 3,4 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 14 | 48 | Jenny Svabo | 1990 | Frælsi |

Kvinnur (ca. 6,8 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 40 | 07 | Ann Østerø | 1967 | Bragdið |
| 2 | 43 | 16 | Lisa Frederiksberg | 1974 | Strendur |

Menn (ca. 6,8 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 24 | 56 | Sam Vang | 1970 | Bragdið |
| 2 | 25 | 07 | Jonhard Larsen | 1966 | Treysti |
| 3 | 25 | 55 | S. B. Justinussen | 1967 | Bragdið |
| 4 | 26 | 45 | Edgar Caballero | 1982 | Roysnið |
| 5 | 28 | 08 | Trygvi Hansen | 1966 | Bragdið |
| 6 | 28 | 53 | Dorian Petersen | 1968 | Bragdið |
| 7 | 30 | 56 | Flemming Petersen | 1960 | Roysnið |
| 8 | 32 | 56 | Niels Hansson | 1964 | Bragdið |
| 9 | 32 | 59 | Torleif Thorleifsson | 1967 | Selatrað |
| 10 | 37 | 05 | Kristm. Johannessen | 1968 | Skáli |
| 11 | 37 | 20 | Robert Jensen | 1971 | |

Menn veteranar (ca. 6,8 km)

| Nr. | Min. | Sek. | Navn Eftirnavn | Árg. | Felag/bústaður |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 26 | 46 | Jósvein H. Olsen | 1958 | Bragdið |
| 2 | 29 | 43 | Steindor Hjaltalin | 1949 | Bragdið |
| 3 | 31 | 41 | Robert Vilhelmsen | 1951 | Bragdið |
| 4 | 32 | 32 | Harry Hansen | 1938 | Roysnið |
| 5 | 34 | 42 | Asbj. Mikkelsen | 1956 | Skáli |
| 6 | 37 | 40 | Regin Jóanesarson | 1943 | Vestmanna |


Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!





Føroya blindastovnur

Skeið fyri blind og sjónveik í patchwork

Undirvíst verður mánadagar og mikudagar báðar dagar frá kl. 13.00 til 16.30

í tíðarskeiðnum frá 2. til 23. juni

Áhugað kunnu venda sær til:

Føroya blindastovn
tlf. 31 81 23
ella
tlf. 31 82 22

Suzuki Intruder VS 750 DL



Árgang 91 · km. 37.000
til sølu fyri 75.000 kr.
Ring 33 30 70 ella 53 30 70

Regluligi býráðsfundurin

sum lýstur er at verða 27. mai, verður ístaðin 3. juni kl. 16.00.

Runavíkar býráð

Føroya Fótbóltsskúli

Fótbóltssamband Føroya skipar aftur í ár fyri fótbóltsskúlum kring landið.

Skúlarnir eru fyri børn í aldrinum 8-14 ár.

Í ár verða skúlarnir tríggir í tali:

24. juni 2004 kl. 13.00-18.00 og 25. juni 2004 kl. 10.00-16.00 í Sandavági
01. juli 2004 kl. 13.00-18.00 og 02. juli 2004 kl. 10.00-16.00 í Vági
09. juli 2004 kl. 13.00-18.00 og 10. juli 2004 kl. 10.00-16.00 á Toftum

Høvuðsvenjarar eru:
Atli Gregersen, Páll F. Joensen, Álvur Hansen og Ábraham Løkin.

Tá skúlarnir enda, fáa børnini eina T-shirt og eina sodavatn, ið Føroya Bjór hevur latið, og góðgæti, ið P/F Kjølbro heilsølan hevur latið. Somuleiðis fáa tey prógv og ein fótbólt.

Tilmeldingarbløð verða løgd út til feløgini, á posthúsini og fólkaskúlarnar kring landið 04. juni 2004, og er tilmeldingarfreistin 14. juni 2004.

Fótbóltssamband Føroya

Sosialurin 341800

Summarhús til sølu



Hesi summarhúsini við Limfjørðin, bert 15 min. frá Ålborg, eru til sølu.

Húsini eru sera góð, og vælhildin. Búrúmd 75 m² + úthús við øllum urtagarðsamboðum. Vælhildið grundstykki, sum er 1500 m².

Í húsunum eru øll vanlig búnýti.

Katrin Biskopstø tlf 75 65 24 og 98 31 15 77

Katrin Biskopstø
Mylnugøta 29
FO-700 Klaksvík

Sosialurin 341800

Magnus Heinasonargøta 23. 1,
Postboks 205, FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 31 89 03, Fart. (+298) 21 89 03
Fax (+298) 31 87 03

bókhaldsvirkið RannTeld

Bókhald - Skuldararøkt - Ráðgeving - Skattauppgerð

Matstova til sølu

Vegna viðskiftafólk selja vit vælrikna og vælvitjaða matstovu í leigaðum hølum í miðbýnum í Tórshavn. Í matstovuni er alt nýmótans innbúgv og útbúnaður og verður hon seld um nóg høgt boð fæst.

Seriøs áhugaði kunnu venda sær til okkum á telefon 31 89 03 ella 21 89 03, telefax 31 87 03 ella t-post: rannteld@post.olivant.fo

RannTeld er eitt bókhaldsvirki, sum røkir skrivstovu-, bókhalds- og aðrar uppgávur fyri einstaklingavirkir, smápartafeløg og partafeløg. Eftirspurningurin eftir teimum tænastum RannTeld veitir er støðugt vaksandi, samstundis sum tænastuumráðið eisini økist í hvørjum. RannTeld byrjaði sítt virksemi í 1991 við einum starvsfólki. Í dag hevur RannTeld fýra fólk í starvi

SKJÓTTGANGANDI BAY-LINER 2255 SUNBRIDGE
...bíliga til sølu - fyri hægstbjóðandi



Ringið og hoyri nærri
TEL 77 00 86

Gravari søkist

Søkt verður við hesum eftir einum fólki til gravara og at røkja kirkjugarðin á Skála.

Starvið, sum er eitt deiltíðarstarv, verður sett skjótast møguligt og er fyrsta árið at rokna sum royndartíð.

Skrivlig umsókn skal vera Kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. juni 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivaran á tlf. 441179.

Bygdaráðið skilar sær rætt til at velja millum umsøkjararnar ella ongan at taka.

Skála kommuna